# entamálaráðharri

maður. Nei, hann er eisini maður, hvørs megi ber um deyðans gátt, eins og hjá Óðini ella Gandálvi í Ringanna Harra. Tróndur er, við øðrum orðum, gandakallur.

Men hann er meira enn tað.

Hjá honum stendur fyrsti skúli í Føroya søgu. Brúka vit nútíðar málburð, kunnu vit siga, at Tróndur er okkara fyrsti mentamálaráðharri.

Við hesum Tróndardøgum skriva vit enn eitt kapitul um Trónd. Tað er mín vón, at vit við hesum kapitli fortelja um eitt fólk, sum varir og lærir av søguni og í henni sær vísdóm. Tí eitt fólk, ið ikki lærir av søguni, er dømt at elta fortíðar misslóðir.

Tað skal vera mín vón, segði løgmaður víðari, at minnið um henda mann, skúlamannin, klóka telvaran og Føroya helst fyrsta intellektuella, fer at styrkja okkum í stríðnum at sigla nútíðar eins og framtíðar krøppu og lúnsku íður um Mjóvanes og úti á heimsins høvum, har landsins synir sigla.

Við ynski um at vit við støði í hesum minni varða av okkara dýrabara náttúrutilfeingi, at vit menna okkara útbúgving, at vit víðka okkara verðsliga banka við nýggjum hugskotsfæi, og at vit í framhaldandi samljóði skapa framburð og vælferð – skal hiðani við Tróndargrund við Gøtuvík, mín heilsan vera egnu orð Tróndar:

*Givnir eru einglar góðir*
*ganga ei eg eina má,*
*ferðum mínum fylgja fróir*
*fagrir einglar Guði frá;*
*biði bøn eg, fyri Krist*
*bera mína bøn teir vist;*
*syngi sálm eg Guð at æra,*
*sær hann til mín lut at vara.*

Sosialurin fer í komandi bløðum at hava frásagnir frá aldarinnar hátíðarhaldi í Gøtu. (Stór myndafrásøgn er á Portalinum umframt livandi kykmyndir. Rás2 fer seinnapartin í dag millum klokkan 15 og 17 at varpa út frá tiltakinum í Gøtu.)



*Nógv fólk var samankomið til hátíðarhaldið*



*Tórshavnar manskór sang undir standmyndini*



*Høvdingar og brøður hittast*



*Gøtufólk høvdu latið seg í víkingaklæði henda serstaka dag*



*Fleiri ættarlið frá Trónda í Gøtu*



*Løtan í Gøtu leygardagin var sera hátíðarlig*



*Teir hugna sær í góðveðrinum í Gøtu.*



*Vafflubólkurin hevði úr at gera*